

*Páll Gregersen, formaður í Víkingi, saman við Brandi Jacobsen, samskipara hjá Víkingi, eru tveir av høvuðsfyrireikarunum til teir stóru Víkingadagarnar í Gøtu*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Víkingarnir gera um seg

**Tróndardagarnir enda við einum braki í Syðrugøtu fríggjadagin og leygardagin, tá Víkingadagar og G!Mini eru. Tónleikur, Trøllapætur, Angela og Hannebal, íslendskir víkingar, víkingagrill og mangt annað verður á skránni**

VÍKINGADAGAR
*Jonhard Hammer*
*jonhard@sosialurin.fo*

Talan er ikki um vanliga bygdastevnu, sum ítróttarfelagið hjá leirvíkingum og gøtufólki skipar fyri í Syðrugøtu, og sum hevur fingið heitið Víkingadagar, sigur Páll Gregersen formaður i Víkingi.

### Bardagi á sandinum

Á Sandinum í Syðrugøtu fara mongu undirhaldstiltøkini fram. Úr Íslandi eru komnir 15 víkingar, ið fara at sýna fram kynstur innan bardaga og leik. Hetta fer fram bæði fríggja- og leygardagin.

Leygardagin fer Angela at skipa fyri stórum barnatiltaki frá klokkan 14. Á hesum tiltaki vera bæði Trøllapætur, omman, Angela og Hannebal. Har verður eisini eldshow, andlitsmáling og ponny ríðing. Tiltøkini byrja longu klokkan 14 og halda á til út á kvøldið.

Út á kvøldið verður skipað fyri ymiskum undirhaldi og fram móti midnátt verður felagssangur og midnáttarrøða, áðrenn G! Mini heldur fram á Spæliplassinum og dansur verður við Sandin.

### Einki tivoli – eitt gjald

Í Víkingi hava tey ásannað, at tíðin so smátt er farin frá siðbundnu tivolibásunum við 21-spæli, tombola, fiskibrunnum og øðrum, og tí hava tey gjørt av at skapa eitt tiltak, ið meira snýr seg um hugna og undirhald.

- Vit hava avgjørt, at fólk skulu hugna sær, uttan at skula rinda fyri hvørt nikk og prikk. Atgongumerkið til Víkingadagar kostar 100 krónur, og tað er galdandi til so at siga øll tiltøkini, Víkingur skipar fyri, sigur Páll Gregersen, sum tó leggur aftur, at mat og drekka mugu fólk so gjalda fyri umframt.

- Vit hava gjørt eina skrá, ið er rættuliga umfatandi, og sum saman við G! MINI røkkur víða um til nógvar ymiskar áhugabólkar, so vónandi kemur nógv fólk til Syðrugøtu fríggja- og leygardagin, sigur Páll Gregersen.

### Víkingagrill av Viðareiði

Av grillini hjá kokkinum av Viðareiði vera eingir útlendskir búffar at fáa í ár. Yvir kolinum fer nevniliga ein føroyskur oksafjórðingur at hanga.

Víkingadagarnir í Syðrugøtu byrjar klokkan 16 fríggjadagin, tá økið við matbúðum og framsýning letur upp. Møguleiki verður at síggja Víkingarnar berjast og jongløírar og eldspýtarar fara eisini at sýna fram kynstur fleiri ferðir fríggjadagin. Á midnátt verður skipað fyri løttum dansitónum, sum Flemming og Rúni fara at stíla fyri.

Leygarkvøldið spælir Lítli Johann til dans í Tjaldinum.